

www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 06 - 2012

# Sáttmálastríð kann steðga framleiðsluni

Arbeiðsgevararnir á norska landgrunninum hótta næstan 6.000 arbeiðsfólk á pallunum við verkbanni, um teirra fakfeløg gera av at fara í verkfall. Avleiðingin kann verða, at øll gass- og oljuframleiðslan steðgar. Tað verður kortini ikki enn, at framleiðslan møguliga fer at steðga. Partarnir skulu hittast til semingsfundar tann 22. og 23. juni, men báðir partar hava fyrireikað seg til at lýsa ávikavist verkfall og verkbann, um einki kemur burtur úr semingsroyndini. Fakfeløgini stúra fyri, at arbeiðsgevararnir vilja hava slit, so gassflutningurin til Týsklands steðgar, tí tað fer at gera, at staturin leggur upp í samráðingarnar. Tær fyrstu sáttmálasamráðingarnar fyri oljuvinnuna á landgrunninum endaðu við semju nú um mánaðarskiftið. Tær snúðu seg um viðurskiftini hjá teimum, sum arbeiða á flótandi pallum. Úrslitið varð, at tey fingu 4,9 prosent meiri í løn ella í minsta lagi 24.000 norskar krónur afturat um árið, skrivar Aftenbladet.